


# Holocaust-offur vitja í Føroyum

**Tveir jødiskir gestir, ið hava upplivað Holocaust innat kroppin, undir 2. heimsbardaga, vitja í Føroyum í hesum døgum. Hann vaks upp í Warzawa, meðan hon vaks upp í Berlin. Í 1944 vóru tey bæði 13 ára gomul. Hóskvøldið verður spennandi kvøld í Miðlahúsinum har hjúnini Menakhem og Hanna Ben Yamin siga frá teirra lívi. Sosialurin fekk eina samrøðu við parið yvir ein kopp av kaffi**

*Johan Jacobsen*
*johan@sosialurin.fo*

Menakhem hevur orðið í síni tryggu hond. Tað er týðuligt, at hann er ein maður, ið er vanur við at hava orðið. Hann dugir væl at orða seg, skemtar og kryddar prátið við líknilsum og orðatøkum, júst sum ein rættur røðari.

Í prátinum verður nomið við evnir, ið dagliga vekja heimsins áhuga. Menakhem sigur frá sínum sjáldsama og hendingaríka lívi. Vit práta um lívið í Ísrael í dag, ræðuliga hópmorðið av jødum undir 2. heimsbardaga og um stovnina av Ísrael. Hann sigur m.a. frá spennandi ferð síni úr Italiu til Ísraels í skipi við 1600 jødiskum flóttafólkum, ið nýliga vóru latin leys úr týsku týningalegunum.

Hansara lívsstarv er innan fiskivinnuna og er tað gjøgnum hesa leið hann og kona hansara eru komin hendan vegin. Óli Jacobsen, formaður í Føroya Fiskimannafelag og blaðstjóri á FF-blaðnum, og Menakhem kennast. Teir hittust fyri fyrstu ferð á eini altjóða fiskivinnuráðstevnu yviri í statunum. Líka síðan hava teir hildið sambandið teirra millum við líka. Menakhem hevur einaferð verið her áður, hetta var í samband við Farec-ráðstevnuna í 2004. Óli hevur eisini skrivað tríggjar greinar um teirra hendingaríka lívið hjá hesum báðum, hesar finnur ein á heimasíðuni hjá Føroya Fiskimannafelag (nr. 320, 348 og 349).

Nógv ferðing hevur merkt hendan seinasta partin av yrkisleið hansara. Hann hevur arbeitt støðugt fyri 8 lond og vitja umleið 50 onnur í arbeiðsørindum.

*Eg havi hoyrt hesa søguna fyrr. Men at sita yvirav einum, ið hevur upplivað hesar ræðuligu umstøðurnar, og hoyra hann siga frá hesi søguni, rørir ein av álvara, hóast eg í løtuni eri upptikin av at skrivi tað niður, sum hann sigur. Ímeðan kølnar kaffi í koppinum.*

Ráðgeving fyri ymiskum stovnum og myndugleikum, greiningar av ymiskum málum og tilmælum, ið hava við fiskivinnu at gera – hesi lutir hava myndað hansara starv. Og, sum hann sigur við meg, so hevur hann ikki stundir til at hugsa um at skriva endurminningar.

**Støðan í Miðeystri – ein dagur søtur og annar beiskur**

Nú um dagarnar leikar tað hart á í stríðnum millum ísraelska herin og palestinar. Dagliga hoyra vit, hvussu tað stendur til. Men tilburðirnar nerva tey bæði lítið. Hetta hava tey sæð fyrr. – Støðan í Miðeystri í dag, er sum við fiskastovnunum, teir broytist frá degi til dags. Ein dagur søtur, annar dagur beiskur: "One day honey, one day onion". Soleiðis hevur tað verið leingi.

– Støðan har er heilt serlig – ein kann ikki gera brúk av vesturlendskum logikki fyri at skilja støðuna harniðri. Um ein ger tað, so villist ein úti í skógini og finnir hvørki høvd ella halan í málinum, staðfestir Menakhem.

Hann greiðir, við einum líknilsi, sera lívliga frá, hvussu hann sær stríðið, í stóran mun, ganga fyri seg í einum heimi av orðum, har ein til endans trýr orðunum. Og síðan fylgja gerðir, ið aftur hava álvarsligar fylgjur við sær. Her sipar hann til støðuna hjá arabisku samfeløgunum har veruleikin ikki verður góðtikin. - Eftir seks daga kríggið varð eingin ósigur kunngjørdur... í Egyptalandi og Sýria hátíðarhalda tey hesar dagarnar. Tað er slíkum umstøðum ein er noyddur at liva við í Miðeystri. Ein veit ongantíð hvat kann henda.

Í prátinum koma vit eisini inn á málið um Muhammed-tekningarnar. Menakhem er ivasamur mótvegis hesum tiltakinum. – Hvat er endamálið? At vísa at vit eru frísinnað? Eg síggi ikki heilt meiningina við at tekna slíkar tekningar. Eg hevði ikki teknað tær, eg kenni jú til teirra kenslusemi viðvíkjandi einum slíkum evni sum profetur teirra.

**Arabisk grannabygd í Ísrael**

Parið býr í eini minni bygd nærhendis Nazaret. Í grannabygdini búgva fleiri arabiskir beduinarar, sum tey síggja nógv til. Tey liva í sátt og semju. Menakhem greiðir frá at í Ísrael búgva fleiri arabarar. Men tey hava ongar trupulleikar við grannunum. Heldur hinvegin.

– Nei, har er eingin trupulleiki. Tá ið tað kemur til persón til persón, so er sum so eingin trupulleiki. Islam, sum trúarskipan góðtekur jødar og eisini tey kristnu. Tað er bara hasin muezzin – hann, sum kallar til bøn – í grannabygdini, sum irriterar okkum onkuntíð, heldur Menakhem skemtandi fyri.

– Nei, grundleggjandi er eingin trupulleiki, tá tað kemur til persón til persón. Eg havi ofta arbeitt saman við arabarum, og havi havt eitt gott samstarv, slær Menakhem fast. Konan, Hanna, skoytir uppí, at beduinar søguliga hava havt tað lættari at arbeiða saman við øðrum, ið koma uttanífrá. Teir hava, á ymiskar hættir, skilt seg frá arabiska fólkinum, hóast teir so avgjørt kalla seg arabar. Hetta kemst av teirra politisku søgu og lívihátti.

– Vit keypa inn í teimum somu matvøruhandlunum og liva í sátt og semju. Ein vaskikona kemur framvið hjá okkum eina ferð um vikuna. Hon ger reint og líknandi. Og vit hava nógv